# Gunnar setti nýtt føroyskt met

**Sunnudagin skipaði Føroya Triathlon Felag fyri triathlon kapping í tí sokallaða OL-teininum. Undirtøkan var góð, veðrið var gott og lagið á vinnaranum var gott tá hann frætti, at hann hevði sett nýtt føroyskt met á hesum teini.**

TRIATHLON
*Tíðindaskriv*

Tað vóru ikki færri enn níggju manns, ið tóku dystin upp sunnudagin og bjóðaðu hvør øðrum av á tí sokallaða OL-teininum, ið er 1500 metrar svimjing, 40 km súkkling og 10 km renning.

Svomið bleiv í Svimjihøllini í Gundadali, og súkklað bleiv frá Svimjihøllini til Kaldbak, til Kaldbaksbotn, aftur til Kaldbak og so allan vegin aftur til Havnar. Súkklan bleiv skift við renniskógvar uttan fyri Plantusøluna og so gekk leiðin allan vegin yvir til Føroya Sparikassa Yviri við Strond, og aftur niðan til Plantusøluna. Hesin teinur er 5 km og teinurin skuldi tí rennast tvær ferðir.

### Súkklingin avgjørdi

Fleiri góðir svimjarar vóru við, og tað hevði tað við sær, at hesir vóru lidnir við svimjingina tá fleiri av hinum bert høvdu svomið hálvan teinin.

Bogi Lenvig, Hallur Stakksund og Eli Christiansen eru allir ”gamlir” svimjarar, og høvdu teir súkkla eina góða løtu tá vinnarin, Gunnar Dahl-Olsen, setti seg á súkkluna. Men væl gekk við súkklingini, og tað gekk tí ikki long tí fyrr enn Gunnar hevði tikið allar aftur.

Bogi Lenvig telist millum bestu rennararnar í landinum, og tí var umráðandi hjá Gunnari at vinna so nógva tíð sum gjørligt aftur til Boga áðrenn hann slapp í renniskógvarnar.

Hetta eydnaðist eisini og tá Bogi parkeraði súkkluna, ja so hevði Gunnar runnið í uml. 10 minuttir. Hetta er long tíð, men hóast hetta, so vóru nøkur ið hildu, at Bogi allarhelst fór við sigrinum.

Eli kláraði seg eisini væl á súkkluni og eisini hann tók seg skjótt inn á Boga og Hallur. Eisini hann vann sær nakrar minuttir framman fyri Boga og Hall. Og so út at renna. Eli hevði javnt góða ferð, og hann megnaði at halda tørn líka á mál. Tað bleiv til eitt 2. pláss hjá Eli. Bogi gjørdist nummar trý.

Beinir Rasmussen stóð seg eisini væl og leingi lá hann framman fyri bæði Boga og Hallur, men tá farið var undir teir seinastu 5 km, ja so fóru bæði Bogi og Hallur frammum, og Beinir mátti tí taka til takkar við einum 5. plássi.

Væl gekk eisini hjá Eyðtór Joensen, ið júst er byrjaður aftur at venja eftir ein longri steðg. Eyðtór kom smílandi um mállinjuna og tað sá út sum um, at hann saktans kundi runnið bæði ein og tveir túrar aftrat.

### Á odda samanlagt

Undan kappingini sunnudagin lá Eli Christiansen á odda, men við sigrinum tryggjaði Gunnar sær 40 stig og liggur nú á odda við 133 stigum í Grand Prix kappingini.

Vinnarin av Grand Prix kappingini verður funnin í seinnu helvt av september.

Tvey umfør eru eftir og tá verður kappast í ávikavist Sprint Triathlon og síðani á OL-teininum. Hesar báðar kappingar eru samstundis FM-kappingar.

**Úrslitini í kappingini vóru hesi:**

| Nr. | Navn | Svimjing | Skift 1. | Súkkling | Skift 2. | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Gunnar D Olsen | 23:16 | 2:14 | 1:06:21 | | 43:08 | 2:14:59 |
| 2. | Eli Christiansen | 22:05 | 1:55 | 1:11:45 | | 44:11 | 2:19:56 |
| 3. | Bogi Lenvig | 19:35 | 2:10 | 1:23:55 | | 38:35 | 2:24:18 |
| 4. | Hallur Stakssund | 20:30 | 2:26 | 1:22:07 | | 42:58 | 2:28:01 |
| 5. | Beinir Rasmussen | 24:45 | 1:45 | 1:13:28 | | 50:25 | 2:30:23 |
| 6. | Evald Rasmussen | 24:49 | 1:16 | 1:21:27 | | 50:03 | 2:37:37 |
| 7. | Kári Simonsen | 29:09 | 2:52 | 1:17:34 | | 50:48 | 2:40:23 |
| 8. | Eyðtór Joensen | 37:08 | 2:35 | 1:21:54 | | 47:28 | 2:49:07 |
| 9. | Robert Vilhelmsen | 37:23 | 4:05 | 1:35:13 | | 51:25 | 3:08:06 |

**Samlaða støðan aftan á fýra umfør:**

| Menn | | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Gunnar Dahl-Olsen | 133 |
| 2 | Eli Christiansen | 128 |
| 3 | Bogi Lenvig | 114 |
| 4 | Hallur Stakksund | 110 |
| 5 | Evald Rasmussen | 66 |
| 6 | Kári Simonsen | 58 |
| 7 | Beinir Rasmussen | 52 |
| 8 | Dia Jacobsen | 30 |
| 9 | Eyðtór Joensen | 36 |
| 10 | Robert Vilhelmsen | 32 |

| Kvinnur | | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Katrin Sørensen | 80 |
| 2 | Rannvá Jacobsen | 74 |
| 3 | Annika Jacobsen | 30 |
| 4 | Brynhild Klein | 26 |

## Gott úrslit til JNM í Bogaskjóting

**Seinasta vikuskifti luttóku tríggir ungir bogaskjúttar í kappingini um Norðurlandameistaraheitið fyri juniorar, sum varð skotið í Helsinge í norðursælandi**

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*

Skjúttarnir vóru Eirikur í Jákupsstovu (14 ár) recurve, Annika Vang (13 ár) recurve og Alberta Gaardlykke (16 ár) compound. Øll skutu í aldursbólkinum 13-15 ár, t.v.s. tey sum fylla 16 ár í ár, kundu eisini luttak í hesum aldursbólki. Øll kappingin varð skotin á 40 metra frástøðu móti 122 cm skivu.

Við í allari kappingini vóru 137 bogaskjúttar úr Svøríki, Noregi, Danmark og Føroyum.

### Leygardagur 8. juni

Innleiðandi umfarið umfataði 2 ferðir 36 pílar. Sólin skein frá klárum himni, men var sera nógvur vindur. Hetta darvaði skjúttunum alsamt.

Hóast hetta er fyrsta uttandura kapping hjá okkara skjúttum nakrantíð, vístu teir hegni. Besta úrslitið fekk Eirikur, sum bleiv nr. 5 av 18 skjúttum. Annika bleiv nr. 9 av 18 skjúttum og var sera javnt um miðjuna á hennara bóli. Alberta hevði tann avgjørt sterkast bólkin har m.a. tríggjar danskar gentur, sum hon hevur verið jøvn við í øðrum donskum kappingum fyrr í ár. Alberta bleiv nr. 6 av 8 luttakarum.

### Sunnudagur 9. juni

Við hesum úrslitum blivu skjúttarnir førdir inn í eitt finaludiagram soleiðis, at nr. 1 dystast móti tí seinasta, nr. 2 móti næstseinasta o.s.fr.

Hesin sunnudagur byrjaði aftur við sól og nú var eitt sindur minni vindur, men tiltók hann aftur sum dagurin gekk.

Fyrst skuldu Eirikur og Annika skjóta 18 pílar hvør í 1/8-útilokingini, meðan Alberta var beinleiðis í 1/4-finaluni og mátti bíðja.

Eirikur møtti einum norskum drongi, sum varð nr. 12 innleiðandi, og vann Eirikur trygt á honum við 134-97 og kom víðari til 1/4-finaluna.

Annika mátti lúta fyri eini sera væl skjótandi svenskari gentu við 120-155 og var sostatt út av kappingini. Hetta úrslit gjørdi, at Annika fór nakað niður á listan og gjørdist endaliga nr. 15. Nevnast kann, at sama svenska genta tapti sína 1/4-finalu.

So var tíðin komin til Albertu, sum í 1/4-finaluni, har bert 12 pílar verða skotnir, møtti einari danskari gentu, sum vildi hava uppreisn fyri tvær taptar innandura kappingar móti Albertu í vetur. Høn gjørdi eisini bart við úrslitinum 90-112.

Nevnast kann, at henda danska gentan bleiv endaliga nr. 2, meðan Alberta bleiv nr. 7.

Eirikur skuldi síðan undir sína 1/4-finalu móti einum 13 ára gomlum svenskum drongi, sum er á veg frameftir við ferð og er besti skjútti sviar hava í hesum aldursbólkinum.

Vindurin var nú vaksin, men gekst væl álíkaæl, hóast Eirikur tapti við 88-104, bleiv hann endaliga nr. 7, meða svenski drongurin bleiv nr. 3.

### Samanumtøka

Okkara skjúttar siga seg hava lært eina rúgvu um at skjóta í stórum kappingum, um at skjóta í nógvum vindi og sterkari sól, um kappingarpsyku, og so verða nógv nýggj vinarbond knýtt.

Eirikur hevur rós uppiborið fyri sítt góða úrslit í sínum sterka bólki. Annika og Alberta stríddust væl, men mistu nakað nógv í finaluskjótingunum.

Næstan junior NM verður í Svøríki næsta summar, og verður kappingin hildin í feltskjóting – í skógarumhvørvi.

## Eingin formaður

**Niclas Joensen tekur ikki við afturvalið sum formaður í Flogbóltssambandi Føroya, men eingin er í uppskoti at taka við**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Á aðalfundinum hjá Flogbóltssambandi Føroya var ætlanin, at nýggjur formaður skuldi veljast, nú formaðurin seinastu seks árini, Niclas Joensen, hevur boðað frá, at hann ikki tók við afturvali.

Eingin var í uppskoti til nýggjan formann, og tí hevur FBFgjørt av, at nýggjur fundur skal haldast, og verður hesin ætlandi um ein mánað ella so.

### Stórt arbeiði

Tá fólk ikki fáast at stilla upp til formansval, er tað aloftast soleiðis, at onkrar ósemjur eru, sum fáa fólk at setast afturá, men tað tykist so avgjørt ikki vera støðan í Flogbóltssambandinum.

Heldur er tað soleiðis, at tað er torført at fáa nakran at taka við eftir Niclas, tí fólk helst vilja sleppa undan at verða vigaði á somu vágskál, sum fyrrverandi formaðurin. Í hansara skeiði hevur Flogbóltssambandið og flogbólturin í Føroyum sum heild ment seg sera nógv. Sjálvandi hava veddingarpengarnir frá donsku Tipstænastuni hjálpt væl til, men virksemið hjá flogbóltinum er í dag størri og breiðari enn nakrantíð áður.

### Broytt steypakapping

Eitt evni, sum fekk nógva umrøðu á aðalfundinum var annars skipanin av steypakappingini. Her var ein broyting í uppskoti, soleiðis at fyri at kunna vera við í finaludystinum skal liðið hava tikið lut í báðum teimum stóru kappingunum, sum geva atgongd til steypafinaluna. Nevnliga Fleyr- og Mjølnir kappingunum.

Eitt nú vóru fuglfirðingar ikki við í Fleyr kappingini í fjør, tó at teir vóru í steypafinaluni, men hvussu er og ikki, so vann hetta uppskotið ikki frama. Somuleiðis fall eitt uppskot um, at stigini ikki skuldu býtast í helvt, tá fyrra kappingarhálva er runnin.

Smærri broytingar vórðu annars framdar í kappingini hjá yngru deildunum, soleiðis at FM-kappingin í hesum nú bert umfatar vikuskiftiskappingar.

### Yvirskot

Fíggjarliga royndist árið eisini á eini leið hjá Flogbóltssambandinum. Úrslitið varð eitt yvirskot á 143 tkr., eftir at talan tey bæði undanfarnu árini hevur verið um hall.

Nú Niclas Joensen leggur frá sær sum formaður í Flogbóltssambandinum hevur FBF eina eginogn upp á 410 tkr.



Bólkur B:

# Spenningur allan vegin

**Tað var ikki fyrr enn at dómararnir í seinastu dystunum høvdu bríkslað fyri seinastu ferð, at tað var greitt, hvørji lið komu víðari úr bólki B**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eitt dundurskot frá Nelson Cuevas sjey minuttir fyri leiklok tryggjaði Paraguay luttøku í 1/8-finalunum í HM-kappingini.

Undan hesum hevði Paraguay annars verið í ringum skørum. Um hálvan fyrra hálvleik fingu teir Paredes riknan av vøllinum, og tá Slovenia stutt fyri hálvleik skoraði til 1-0, tóktist alt at vera rokið.

Onkursvegna megnaðu Chilavert og Co. tó at reisa seg. Við tíggju móti ellivu vunnu teir seg upp á 2-1, men hetta var framvegis ikki nóg mikið, uttan so at Suður Afrika tapti við minst tveimum málum fyri Spania.

So var tað, at Cuevas fekk bóltin uttan fyri brotsteigin. Hann dróg einar tvær ferðir, og so smekkaði hann til. Bólturin tók undirsíðuna av tvørtrænum og støkk niður inni í málinum, og so var fagnaðurin sjálvandi ovurstórur.

### Farvæl til Suður Afrika

Tað sama kann helst ikki sigast um Suður Afrika, sum við hesum gjørdust akkurát ov stuttir. Tvær ferðir javnaðu teir móti oddaliðnum, Spania, men báðu ferðirnar svaraðu spaniólarnir aftur, og tó at Camacho seinastu løtuna valdi at skifta bæði Raul og Morientes út, so megnaði Suður Afrika ikki at svara aftur triðju ferð.

Við hesum endaðu Suður Afrika og Paraguay jøvn í stigum og við sama málmuni, men tá Paraguay hevði skorað eitt mál fleiri, gjørdust tað teir, sum vunnu seg víðari í kappingini.

**Úrslit:**
**Slovenia-Paraguay 1-3 (1-0)**
1-0: Milenko Acimovic, 45
1-1: Nelson Cuevas, 66
1-2: Jorge Campos, 73
1-3: Nelson Cuevas, 84

**Suður Afrika-Spania 2-3 (1-2)**
0-1: Raúl González, 5
1-1: Benedict McCarthy, 32
1-2: Gaizka Mendieta, 45
2-2: Lucas Radebe, 54
2-3: Raúl González, 57

## HM dystirnir í dag

| | |
|---|---|
| 7.30 | Belgia-Russland |
| 7.30 | Japan-Tunis |
| 12.30 | Póland-USA |
| 12.30 | Suður Korea-Portugal |

## Máltindurin, HM

| | | |
|---|---|---|
| Miroslav Klose | Týskland | 5 |
| Jon Dahl Tomasson | Danmark | 4 |
| Rivaldo | Brasilia | 3 |
| Ronaldo | Brasilia | 3 |
| Christian Vieri | Italia | 3 |
| Pedro Pauleta | Portugal | 3 |
| Papa Bouba Diop | Senagal | 3 |
| Raul González | Spania | 3 |
| Marc Wilmots | Belgia | 2 |
| Rónald Gomez | Costa Rica | 2 |
| Robbie Keane | Írland | 2 |
| Junichi Inamoto | Japan | 2 |
| Nelson Cuevas | Paraguay | 2 |
| Fernando Hierro | Spania | 2 |
| Fernando Morientes | Spania | 2 |
| Henrik Larsson | Svøríki | 2 |
| Hasan Gokhan Sas | Turkaland | 2 |

Bólkur C:

# Eirindaleysur samba-bóltur

**Hóast Brasiliga longu hevði tryggjað sær víðari luttøku, so spardu teir ikki krútið ímóti Costa Rica, sum við greiða tapinum segði farvæl til HM**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hósmorgunin vórðu seinastu dystirnir í bólki C leiktir. Her snúi spenningurin seg um, hvørt tað fór at eydnast Turkalandi ella Costa Rica at vinna seg víðari úr bólkinum saman við Brasilia, sum longu hevði tryggjað sína luttøku.

### Turkar víðari

Tað sá kanska best út hjá Costa Rica, sum við einum javnleiki móti Brasilia vóru vísir í at koma víðari. Tað var kanska væl hugsandi, at Brasilia fór at taka sær av løttum hendan dystin, men høvdu teir hjá Costa Rica roknað við hesum, so gjørdust teir vónbrotnir.

Brasilia spílaði seg nevnliga út frá fyrsta bríksli, og serstakliga Ronaldo vísti, at hóast drúgvan skaðasteðg, so er væl hugsandi, at hann kann gerast maðurin, sum bjargar brasilsku HM-vónunum.

Samstundis spældi Turkaland móti Kina, og her vóru treytirnar eisini greiðar. Turkaland skuldi vinna dystin, og so máttu teir annars bara bíða, hvussu úrslitið hjá Costa Rica lagaði seg.

Kinverjar høvdu undan hesum dystinum ikki skotið nakað mál í sínum fyrsta HM-endaspæli, og tað eydnaðist so heldur í hesum dystinum, sum Turkaland vann 3-0.

Sostatt eydnaðist tað turkum at koma víðari, og har skulu teir hitta vinnaranum í bólki H, sum ikki tykist vera nøkur óyvirkomulig uppgáva. Brasilia fær dyst móti næst besta liðnum í tí bólkinum, og eru teir sostatt longu nú stórfavorittar til í øllum førum at vinna seg fram til hálvfinaluna.

**Úrslit:**
**Costa Rica-Brasilia 2-5 (1-3)**
0-1: sjálvmál, 10
0-2: Ronaldo, 13
0-3:Edmilson, 38
1-3: Paulo Wanchope, 40
2-3: Rónald Gómez, 56
2-4: Rivaldo, 62
2-5: Junior, 64

**Turkaland-Costa Rica 3-0 (2-0)**
1-0: Hasan Gokhan Sas, 6
2-0: Bulent Korkmaz, 9
3-0: Umit Davala, 85



*Brasilia so líkt, so rungaðu samba-rútmurnar um leikvøllin, meðan dysturin móti Costa Rica varð leiktur*

**Bólkur A**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Danmark | 3 | 2 - 1 - 0 | 5 | 2 | 3 | 7 |
| 2 | Senegal | 3 | 1 - 2 - 0 | 5 | 4 | 1 | 5 |
| 3 | Uruguay | 3 | 0 - 2 - 1 | 4 | 5 | -1 | 2 |
| 4 | Frakland | 3 | 0 - 1 - 2 | 0 | 3 | -3 | 1 |

**Bólkur B**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Spania | 3 | 3 - 0 - 0 | 9 | 4 | 5 | 9 |
| 2 | Paraguay | 3 | 1 - 1 - 1 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 3 | Suður Afrika | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 5 | 0 | 4 |
| 4 | Slovenia | 3 | 0 - 0 - 3 | 2 | 7 | -5 | 0 |

**Bólkur C**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brasilia | 3 | 3 - 0 - 0 | 11 | 3 | 8 | 9 |
| 2 | Turkaland | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 3 | 2 | 4 |
| 3 | Costa Rica | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 6 | -1 | 4 |
| 4 | Kina | 3 | 0 - 0 - 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |

**Bólkur D**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Suður Korea | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 1 | 2 | 4 |
| 2 | USA | 2 | 1 - 1 - 0 | 4 | 3 | 1 | 4 |
| 3 | Portugal | 2 | 1 - 0 - 1 | 6 | 3 | 3 | 3 |
| 4 | Póland | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

**Bólkur E**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Týskland | 3 | 2 - 1 - 0 | 11 | 1 | 10 | 7 |
| 2 | Cameroon | 3 | 1 - 2 - 0 | 5 | 2 | 3 | 5 |
| 3 | Írland | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 3 | -1 | 4 |
| 4 | Saudi Arabia | 3 | 0 - 0 - 3 | 0 | 12 | -12 | 0 |

**Bólkur F**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Svøríki | 3 | 1 - 2 - 0 | 4 | 3 | 1 | 5 |
| 2 | Ongland | 3 | 1 - 2 - 0 | 2 | 1 | 1 | 5 |
| 3 | Argentina | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 2 | 0 | 4 |
| 4 | Nigeria | 3 | 0 - 1 - 2 | 1 | 3 | -2 | 1 |

**Bólkur G**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mexico | 2 | 2 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 6 |
| 2 | Italia | 2 | 1 - 0 - 1 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 3 | Kroatia | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 2 | 0 | 3 |
| 4 | Ecuador | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 4 | -3 | 0 |

**Bólkur H**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Japan | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 2 | Russland | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 3 | Belgia | 2 | 0 - 2 - 0 | 3 | 3 | 0 | 2 |
| 4 | Tunis | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 3 | -2 | 1 |